

IRF

# ÁRSFRÁSØGN 2024



Forsíða: Markus Olsen, innsavnari hjá IRF
Myndir: Erla Ziskasen, Harriet Olafsdóttir, Sissal Evudóttir Lervig og IRF

# Innihald


Upplýsingar um felagsskapin ........ 4
IRF fyriskipan ........ 5
Limakommunur og fólkatal ........ 6
Leiðslufrágreiðing ........ 7
Hendingar í árinum ........ 14
- Nýggjur lýsingafilmur um vinnuburturkast ........ 15
- IRF sett eyka orku inn á vinnuøkið ........ 15
- $CO_2$-roknskapir framtíðartryggja vinnuna ........ 16
- Stórar avleiðingar av skeivari skiljing ........ 17
- Almenn móttøka fyri Poul Andriasi Joensen ........ 18
- 25 ára starvsdagur ........ 19
- Verkfall og eingin innsavning ........ 19
- Tríggir nýggir bilar ........ 19
- Løðistøð á Hagaleiti ........ 20
- Nýggjar rutur í Sandoynni ........ 20
- Sigurd Leifsson Lamhauge nýggjur stjóri hjá IRF ........ 20
- Nýtt tilfar til børn um umhvørvi og burturkast ........ 21
- Nýggjur lýsingarfilmur um at skilja jarn og metal ........ 22
- Nú byggja vit panthøllina ........ 24
- Nógvar vitjanir á Hagaleiti í 2024 ........ 26
- Nýggj framsýningarrør ........ 27
- IRF á fleiri tiltøkum kring landið ........ 27
- Ljósareyður dámur á Hagaleiti 8. mars ........ 28

Starvsfólkahópurin 2024 ........ 30
- Starvsfólkamenning ........ 38

Hagtøl 2024 ........ 40
- Hvaðani kemur burturkastið? ........ 42
- Endurvinning ........ 44
- Útflutningur ........ 45
- Jarn og Metal ........ 45
- Pappír og papp ........ 46
- Plast ........ 46
- Serburturkast ........ 47
- Elektronikkur ........ 47
- Glas ........ 48
- Matolja ........ 49
- Olja og oljudálkað vatn ........ 49
- Brenning ........ 50
- Tyrving ........ 52
- Rottangatøming ........ 53
- Um hagtølini ........ 54
- Niðurstøða ........ 54

Høvuðstøl ........ 56
Talvur ........ 58
Gongdin í rakstrinum ........ 61
Rakstrarúrslit samanborð við fíggjarætlan ........ 62
Leiðsluátekning ........ 63
Váttan frá óheftum grannskoðara ........ 64
Nýttur roknskaparháttur ........ 66
- Rakstrarroknskapurin ........ 66
- Fíggjarstøðan ........ 67

Rakstrarroknskapur ........ 68
Fíggjarstøða ........ 69
Rakstrarroknskapur býttur á økir ........ 70
Notur til roknskapin ........ 71
Gjaldførisfrágreiðing ........ 80
Rakstrarroknskapur fyri oljureinsiverkið ........ 81
Rakstrarroknskapur fyri reinsitænastuna ........ 82
Rakstrarroknskapur fyri verkstaðið ........ 83
Rakstrarroknskapur fyri serhøllina ........ 84
Rakstrarroknskapur fyri endurvinningarskipanina ........ 85
Rakstrarroknskapur fyri Nýggjheiðar ........ 87

# Upplýsingar um felagsskapin

**Felagsskapurin**
L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin IRF
Víkarvegur 107, 520 Leirvík
irf@irf.fo
www.irf.fo
Tlf: 41 42 43
V-tal: 353477
Heimstaðarkommuna: Eysturkommuna
Starvsfólk: 95 ársverk

**Nevnd**
Gunvá við Keldu, Norðoyggjar, forkvinna
Oluf Müller, Norðstreymoy, næstformaður
Hans Anders Jacobsen, Eysturoy, nevndarlimur
Jóanis Albert Nielsen, Vágar, nevndarlimur
Alvi Mortensen, Suðuroy, nevndarlimur
Bjarki Henriksen, Sandoy, nevndarlimur

**Stjórn**
Sigurd Leifsson Lamhauge

**Grannskoðan:**
P/f JANUAR
Óðinshædd 13
Postsmoga 30, FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 47 00
januar@januar.fo
www.januar.fo

Ársroknskapurin fyri 2024 er góðkendur á ársaðalfundinum, tann ___________ 2025

______________________________

Fundarstjóri

# IRF fyriskipan



# Limakommunur og fólkatal pr. 1. januar

| Limakommunur-økir | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðoyggjar** | | | | | |
| Fugloyar kommuna | 49 | 42 | 43 | 38 | 41 |
| Viðareiðis kommuna | 330 | 344 | 348 | 354 | 354 |
| Hvannasunds kommuna | 428 | 426 | 428 | 418 | 418 |
| Klaksvíkar kommuna | 5.490 | 5.478 | 5.427 | 5.398 | 5.338 |
| Kunoyar kommuna | 150 | 154 | 150 | 147 | 141 |
| **Tilsamans** | **6.447** | **6.444** | **6.396** | **6.355** | **6.292** |
| **Eysturoy** | | | | | |
| Fuglafjarðar kommuna | 1.625 | 1.633 | 1.627 | 1.612 | 1.574 |
| Eysturkommuna | 2.294 | 2.296 | 2.267 | 2.256 | 2.211 |
| Nes kommuna | 1.586 | 1.536 | 1.502 | 1.450 | 1.399 |
| Runarvíkar kommuna | 4.409 | 4.379 | 4.347 | 4.270 | 4.215 |
| Sjóvar kommuna | 1.241 | 1.206 | 1.190 | 1.138 | 1.111 |
| Eiðis kommuna | 783 | 806 | 809 | 789 | 767 |
| **Tilsamans** | **11.938** | **11.856** | **11.742** | **11.515** | **11.277** |
| **Streymoy** | | | | | |
| Sunda kommuna | 1.792 | 1.828 | 1.834 | 1.821 | 1.811 |
| Kvívíkar kommuna | 620 | 599 | 605 | 601 | 624 |
| Vestmanna kommuna | 1.253 | 1.270 | 1.269 | 1.263 | 1.248 |
| **Tilsamans** | **3.665** | **3.697** | **3.708** | **3.685** | **3.683** |
| **Vágar** | | | | | |
| Vága kommuna | 2.218 | 2.198 | 2.184 | 2.163 | 2.140 |
| Sørvágs kommuna | 1.240 | 1.232 | 1.247 | 1.252 | 1.220 |
| **Tilsamans** | **3.458** | **3.430** | **3.431** | **3.415** | **3.360** |
| **Sandoy** | | | | | |
| Sands kommuna | 516 | 529 | 525 | 527 | 537 |
| Skopunar kommuna | 479 | 472 | 472 | 453 | 454 |
| Skálavíkar kommuna | 170 | 142 | 125 | 138 | 145 |
| Húsavíkar kommuna | 112 | 102 | 103 | 109 | 111 |
| Skúvoyar kommuna | 34 | 32 | 34 | 41 | 43 |
| **Tilsamans** | **1.311** | **1.277** | **1.259** | **1.268** | **1.290** |
| **Suðuroy** | | | | | |
| Hvalbiar kommuna | 637 | 640 | 666 | 679 | 670 |
| Tvøroyrar kommuna | 1.734 | 1.750 | 1.774 | 1.769 | 1.744 |
| Fámjins kommuna | 74 | 80 | 79 | 84 | 86 |
| Hovs kommuna | 106 | 106 | 104 | 102 | 97 |
| Porkeris kommuna | 325 | 322 | 332 | 317 | 319 |
| Vágs kommuna | 1.336 | 1.366 | 1.364 | 1.380 | 1.391 |
| Sumbiar kommuna | 342 | 335 | 343 | 357 | 350 |
| **Tilsamans** | **4.554** | **4.599** | **4.662** | **4.688** | **4.657** |
| **IRF tilsamans** | **31.373** | **31.303** | **31.198** | **30.926** | **30.559** |





# Leiðslufrágreiðing

### Leiðslufrágreiðing

Síðani 1989 hevur IRF savnað inn og tikið ímóti burturkasti frá húsarhaldum og vinnulívi í limakommunum sínum. Hesi árini hevur IRF stigvíst ment tænastur og førleikar, soleiðis at felagið í dag ikki stendur aftan fyri samsvarandi feløg í grannalondum okkara.

Tilfeingið, sum í dag kemur inn á móttøkustøð okkara, verður skilt í fleiri ymiskar bólkar, soleiðis at so nógv sum gjørligt kann fara víðari til endurnýtslu ella endurvinningar. Stigvísa menningin á umhvørvisøkinum hevur fylgt við streyminum í tíðini og við eftirspurninginum frá viðskiftafólki og føroyska vinnulívinum.

Veðurlagskreppan í heiminum hevur sett ferð á nýhugsan um endurnýtslu og burðardygd - og ikki minst sett vaksandi krøv um minkandi útlát av koltvísúrni ($CO_2$) og øðrum dálkandi evnum.

Tað er í hesum broytingartíðum, at IRF í dag virkar. Við vaksandi krøvum frá brúkarum, vinnulívi og ikki minst frá altjóða samstarvsfeløgum hjá føroyingum og føroyskari vinnu. Heimurin verður alsamt meiri samanvovin á ein hátt, har ábyrgdin í dag fylgir við alt lívsskeiðið hjá eini vøru. Tað er í hesum sambandi, at ringbúskapur gerst veruleiki.

Alt tilfeingi á klótu okkara er avmarkað. Øll framleiðsla brúkar virðismikið tilfeingi, sum skal endurnýggjast, hvørja ferð ein lutur verður burturbeindur. Ringbúskapur snýr seg um at leingja livitíðina á øllum brúkslutum við tí eina endamáli at halda tilfeinginum í ringrás sum longst og harvið spara upp á tilfeingið í heiminum.

IRF arbeiðir við hagtølum, sum vísa útlátið av øllum teimum ymisku burturkastsbólkunum, sum IRF tekur ímóti. Tøl, ið vísa, hvussu útlátið verður ávirkað, um ein burturkastsbólkur t.d. verður endurvunnin heldur enn brendur ella tyrvdur.

Eitt týdningarmikið úrslit av $CO_2$-hagtølunum er, at IRF skjótt kann veita føroyskum vinnulívi nágreinilig tøl fyri, hvussu stórt $CO_2$-útlát stendst av tí burturkasti, sum vinnan letur IRF. Hetta eru tøl, sum hava alsamt vaksandi týdning á altjóða marknaðinum og sum gerast partur av ESG-frágreiðingum.

Í 2024 komu 36.113 tons av burturkasti inn til IRF. Hetta er 0,6 % meira enn í 2023, men beint undir miðalnøgdirnar seinastu fimm árini.

Kostnaðarstøðið, sum hækkaði nógv í 2022 og 2023, meðan inflatiónin var methøg, er nú komið í eina meira støðuga legu. Rentustøðið var í hæddini á hesum sinni í 2024.



## Búskaparliga gongdin

Rakstrarúrslitið fyri 2024 er 3,9 mió. kr. Í rakstrarætlanini er roknað við 308 tkr. í avlopi. Sostatt er úrslitið væl betri, enn roknað var við.

Inntøkurnar eru 788 tkr. minni enn mett, og útreiðslurnar eru 2,6 mió. kr. minni enn mett frammanundan. Avskrivingarnar eru 1,8 mió. kr. minni enn mett, og rentuútreiðslurnar eru 40 tkr. størri.

Í 2024 gjørdi IRF íløgur fyri tilsamans 11,7 mió. kr. Til samanberingar kann nevnast, at í 2023 vórðu íløgur gjørdar fyri 18,6 mió. kr.

Roknskapirnir fyri oljureinsiverkið, reinsitænastuna, verkstaðið, serhøllina, endurvinningarskipanina og Nýggjheiðar eru við í høvuðsroknskapinum, men eru samstundis settir upp í egnum skjølum í ársfrásøgnini.

Bruttoúrslitið fyri 2024 gjørdist 77,8 mió. kr., sum er 7,6 mió. kr. betri enn í 2023. Ársúrslitið gjørdist 3,9 mió. kr. í avlopi, sum er 3,8 mió. kr. betri enn í 2023.

Fíggjarstøðan javnvigar við 308 mió. kr. í 2024 í mun til 311 mió. kr. í 2023.

## Burturkastsnøgdirnar

Í 2024 tók IRF ímóti 36.113 tonsum av burturkasti. Hetta er sum nevnt ein lítil hækking samanborið við 2023. Nøgdirnar at brenna í 2024 lækkaðu við 33 tonsum, endurvinningarnøgdirnar lækkaðu við 415 tonsum, og nøgdirnar at tyrva hækkaðu við 667 tonsum.

Av teimum 36.113 tonsunum vórðu 63,6 % brend, 24,0 % fóru til endurvinningar, og 12,3 % vórðu tyrvd.

Í mun til vøksturin í tyrvinøgdunum er týdningarmikið at hava í huga, at við nýggju støðini í Nýggjheiðum tekur IRF nú ímóti tyrviburturkasti úr øllum Føroyum. Tað byrjaði IRF við í mai 2023.

## Útflutningurin

IRF sendir nógvar ymiskar burturkastsbólkar av landinum til endurvinningar. Samlaði útflutningurin av endurvinningartilfari í 2024 var 7.689 tons, sum er 1,7 % minni enn í 2023, tá útflutningurin var 7.819 tons. Útflutningurin av endurvinningartilfari í 2024 liggur oman fyri miðaltalið fyri seinastu 5 árini.

Hóast minni varð sent av landinum til endurvinningar í 2024 enn árið fyri, vóru søluprísirnir í 2024 nakað betri. Endurvinningarskipanin gav eitt avlop upp á 217 tkr. í 2024 samanborið við 477 tkr. í 2023.

## Limakommunur og fólkatal

1. januar 2025 vóru vit 54.684 fólk í Føroyum, harav 31.373 búðu í teimum 28 limakommunum hjá IRF. Í limakommununum eru hetta 70 fólk fleiri enn við ársbyrjan 2024. Hóast fólkavøksturin er minkaður, er framvegis fólkavøkstur í Føroyum, og IRF roknar við øktum fólkatali í langtíðarætlan felagsins.

## Limagjald

Á seinasta aðalfundi varð avgjørt, at limagjaldið fyri 2025 skuldi vera 1.385 kr. fyri hvønn borgara. Av hesum eru 1.157 kr. ruskgjald, og 228 kr. eru rottangagjald.

Økt umhvørviskrøv og nýggj burturkastskunngerð kunnu gera tað neyðugt at endurskoða limagjaldið í framtíðini.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok er einki hent, sum broytir metingina av fíggjarstøðu felagsins.

### Rakstrarváðar

Seinnu árini hevur verið fólkavøkstur og viðgongd í búskapinum í Føroyum. Hetta hevur havt hækkandi inntøkur við sær hjá IRF. Í 2022 og 2023 var inflatiónin sera høg, og útreiðslurnar hjá IRF vuksu nógv. Kemur afturgongd í føroyska búskapin og í virksemið hjá vinnulívinum, minka inntøkurnar hjá IRF eisini.

Neyðugt er at fylgja væl við búskapargongdini, so tað er samsvar millum inntøkur og útreiðslur hjá felagnum.

IRF hevur ikki týðandi upphæddir útistandandi hjá einstøkum skuldara. Skuldarar felagsins halda sum heild væl sínar skyldur, men um afturgongd verður í búskapinum, kann tað hava við sær, at gjaldsevnini hjá skuldarunum versna. Tað kann hava ávirkan á gjaldførið hjá felagnum. IRF fylgir væl við gongdini í útistandandi og hevur greiðar mannagongdir á skuldaraøkinum. Renturnar á lánunum hjá felagnum eru bæði fastar og broytiligar. Vandi er við broytiligum rentum, og felagið fylgir væl við gongdini á rentuni.

### Umhvørvisábyrgd og menning

Umhvørvisábyrgd er partur av øllum virkisætlanum hjá IRF. IRF lagar seg áhaldandi til dagførd og herd krøv á umhvørvisøkinum. Landsmyndugleikarnir arbeiða við at seta nýggja burturkastskunngerð í verk. IRF fylgir hesum arbeiði og er, saman við øðrum, partur av dagføringunum á lógarøkinum, soleiðis at tað kemur at líkjast grannalondum okkara og ES. IRF arbeiðir miðvíst við at menna førleikar hjá starvsfólkum á burturkasts- og umhvørvisøkinum, soleiðis at tey eru útbúgvin og tilvitað um hesa umhvørvisábyrgd, sum IRF átekur sær.

Broytt lógar- og samfelagskrøv, menning, tillagingar og broytingar á burturkasts- og umhvørvisøkinum kunnu hava útreiðslur við sær, sum dýrka um rakstur felagsins.













## Íløgur

Í 2024 hevur IRF gjørt íløgur fyri 11,7 mió. kr., og hetta eru 5,9 mió. kr. minni enn mett frammanundan. Orsøkin til henda munin er, at íløgan í Trøllavík ikki byrjaði í 2024 sum ætlað.

### Tyrvimóttøka og reinsiverk í Nýggjheiðum

Nýggja tyrvimóttøkan og reinsiverkið í Nýggjheiðum varð avhendað fyrst í 2023. Írestandi íløguarbeiði er gjørt í 2024 fyri 478 tkr.

### Akfør

Stórur partur av virkseminum hjá IRF er innsavning og flutningur av burturkasti. IRF hevur gjøgnum árini gjørt íløgur í nógv ymisk akfør, sum dagliga hava nógv virksemi og koyra nógv. Akførini krevja sjálvandi nógv viðlíkahald, og tørvur er eisini regluliga á at endurnýggja og keypa fleiri akfør.

Í 2022 bílegði IRF tríggjar nýggjar bilar til at heinta vinnuburturkast. Fyrsti kom seint í 2023, og hinir báðir komu í 2024. Nýggju bilarnir avloystu tríggjar eldri bilar, sum hava verið væl brúktir í nógv ár. Íløgan fyri bilarnar, sum komu í 2024, var 5,3 mió. kr.

Í november 2024 samtykti nevndin at keypa nýggjan rottangabil fyri 4. mió. kr. Hesin bilurin kemur at avloysa rottangabilin í Suðuroynni.

### Panthøllin

Í 2024 gjørdi IRF íløgur fyri 3,2 mió. kr. í nýggju panthøllina, og tilsamans er henda íløgan nú komin upp á 4,0 mió. kr.

Í 2024 varð løgtingslógin um nýggju pantskipanina góðkend, og IRF hevur gjørt avtalu við Umhvørvismálaráðið um at vera pantumsitari í Føroyum.

Somuleiðis gjørdi IRF í 2024 avtalu við MTV Byggivirkið um byggingina av panthøllini í Sandavági. Arkitektafyritøkan Henning Larsen hevur teknað bygningin, og PB Consult er høvuðsráðgevi.

Panthøllin verður avhendað tann 30. mars 2026.

Virksemið av panthøllini kemur at hava egnan roknskap og fer sostatt ikki at ávirka fíggjarligu støðuna hjá IRF.

### Aðrar íløgur

Umframt omanfyri standandi hevur IRF í 2024 gjørt íløgur í onnur tyrvingar- og umlastingarpláss, KT, vektskipan, bingjur, rakstrargøgn og endurvinningarskipan fyri í alt 2,7 mió. kr.

# Støðin í Nýggjheiðum ISO-góðkend

Nýggja reinsiverkið og tyrvimóttøkan hjá IRF vórðu tikin í nýtslu í 2023. Síðan 2021 hava allar støðirnar hjá IRF verið góðkendar sambært umhvørvisstýrisskipani ISO-14001, og í 2024 varð nýggja støðin eisini ISO-góðkend.

Við ISO-góðkenningunum átekur IRF sær at arbeiða við munadyggum loysnum innan fyribyrging, innsavning og hagreiðing av burturkasti frá borgarum og virkjum.




# Endi

Rusk ella burturkast eru orð, sum vit øll hava í okkara hugaheimi. Vit hava ruskspannir, ruskposar, ruskstativ, ruskbilar og so framvegis. Og tað gevur sjálvsagt meining, tí í øllum, sum vit gera, framleiða vit rusk. Matleivdir, pakkitilfar, pappír og papp, restir frá framleiðslu og so framvegis.

Hjá IRF hava vit í fleiri ár arbeitt við eini hugburðsbroyting, har vit skifta orðið “rusk” um við orðið “tilfeingi”. Tað er stór megi í teimum orðunum, sum vit brúka, og skulu vit nærkast einum burðardyggum ringbúskapi, so krevst, at vit hyggja at okkum sjálvum við nýggjum eygum fyri at finna loysnirnar. Rusk er eitt tilfeingi, sum vit eiga at fáa sum best burturúr.

IRF hevur í nógv ár lagt stóran dent á endurnýtslu og endurvinning, og tann kósin fer at halda fram. Málrættað samskifti um skiljing av tilfeingi og um skynsamar broytingar fyri at økja um livitíðina á øllum bólkum, sum IRF tekur ímóti, fer eisini at halda fram.

Ætlanirnar fyri 2025 eru, at IRF í øllum sínum virki skal laga virksemið til at halda tilfeingi í ringrás sum longst. Tað hevur við sær, at virksemið skal metast av nýggjum, so vit eru før fyri minka munandi um nøgdirnar, sum verða brendar ella tyrvdar. Vit skulu eisini minka munandi um okkara egna útlát, og vit skulu hugsa nýtt fyri at røkka hesum málum.

### Varðar laðast á leiðini

Leiðin móti ringbúskapinum verður skipað, meðan hesi orðini verða skrivað. Tankarnir hava nøkur ár á baki, men veruligu tiltøkini byrja at taka skap í hesum døgum. Húsarhald trýsta á fyri størri skiljimøguleikar við hús, og nýggj ættarlið leggja stóran dent á umhvørvisvernd og umhvørvistiltøk.

Altjóða marknaðurin – tað veri seg viðskiftafólk og fíggjarstovnar - setur krøv til sølufyritøkur og framleiðarar og vilja vita, hvussu stórt $CO_2$-útlátið er av virksemi teirra. Um talan t.d. er um matframleiðslu, verða tølini umroknað til $CO_2$ e/kg. $CO_2$-útlátið av einari framleiðslu er partur av samlaðu ESG-frágreiðingini og CSRD (Corporate Sustainability Reporting Directive).

Tað er í hesum veruleika, at IRF vil ganga undan. Við vitan, samstarvi og nýhugsan vilja vit royna at laða varðarnar á leiðini. Men vit kunnu ikki gera tað einsamøll. Tí vil IRF taka upp samstarv við allar viðkomandi samstarvsfelagar, vinnu, felagsskapir og einstaklingar fyri at finna røttu leiðina. Hetta skal gerast, samstundis sum vit varðveita tænastustøðið og førleikarnar, sum eru í felagsskapinum í dag.




# HENDINGAR Í ÁRINUM



## Nýggjur lýsingafilmur um vinnuburturkast

Meira enn helvtin av burturkastinum í Føroyum kemur frá vinnuni, og tað er sera týdningarmikið, at alt hetta burturkastið verður rætt skilt, soleiðis at so nógv sum gjørligt verður endurvunnið.

Fyrst í 2024 kom nýggjur lýsingafilmur hjá IRF út, sum snýr seg um vinnuburturkast. Filmurin er tikin upp á Kambsdali, í Fuglafirði og í Klaksvík, og filmurin lýsir ymiskar støður við burturkasti úr ávikavist byggivinnuni, sjóvinnuni og sjúkrahúsverkinum.

Í filminum greiða vit frá hugsjónini um ein heim við minni burturkasti. Ein heim, har vit í størri mun fyribyrgja, endurnýta og endurvinna burturkast.

Vit kunnu øll gera ein mun fyri umhvørvið og síggja til, at tað burturkastið, sum vit eru við til at framleiða, verður rætt skilt – eisini á arbeiðsplássinum.

## IRF sett eyka orku inn á vinnuøkið

Alsamt fleiri arbeiðspláss vilja skilja meira, men ofta ivast tey í t.d. hvørjar skiljingar eru mest viðkomandi, og hvørji íløt skulu keypast. Í 2024 hevur eitt starvsfólk hjá IRF arbeitt burturav við at ráðgeva vinnuni um skiljing og útgerð.

Í 2024 vóru 42 arbeiðspláss á vitjan hjá IRF við tilsamans 279 starvsfólkum. Á vitjanini fingu tey innlit í virksemi hjá IRF og upplæring í skiljing.

> ”
>
> *Samanumtikið var vitjanin hjá IRF við til at vísa starvsfólkum hjá MEST út yvir ruskspannina og geva teimum eina ítøkiliga fatan av grundarlagnum og viðurskiftunum fyri burðardygga handfaring av burturkasti. Frálíkt átak, ið kann viðmælast!*
>
> Vilhjálmur D. Jakobsen, leiðari
> fyri burðardygd og ESG hjá Mest.



**Tað skal vera lætt**

Hjá IRF arbeiða vit eftir tí sannføring, at tað skal vera lætt at gera tað rætta. Tað skal vera lætt at skilja burturkast og at fáa ta hjálp, sum krevst fyri at koma í gongd, og tað skal vera lætt at fáa góð amboð til at rótfesta og skipa arbeiðið við burturkastsskiljing í praksis. Henda sannføring er orsøkin til, at nógv eldhugað starvsfólk hjá IRF seinastu árini hava arbeitt við menningini av kundaportali, bíleggingarapp, hagtølum, skiljiplakatum, myndateknum og øðrum, sum hevur til endamáls at hjálpa arbeiðsplássum at skilja burturkast.






# $CO_2$-roknskapir framtíðartryggja vinnuna

Í altjóða høpi gerst tað alsamt vanligari hjá fyritøkum at gera árligar, almennar frágreiðingar um burðardygd. Her er talan um frágreiðingar við sonevndu ESG-lyklatølunum. Við ESG, sum stendur fyri Environment, Social og Governance, kunnu fyritøkur arbeiða meira skipað við burðardygd.

### Betri hagtøl til føroysku vinnuna

Nakrar av teimum størru føroysku fyritøkunum eru byrjaðar við ESG-frágreiðingum, og hjá IRF merkja vit í tí sambandi ein øktan eftirspurning eftir góðskutryggjaðum burturkastshagtølum og útlátsfaktorum.

Tølini, sum vinnan hevur tørv á, fáast í ein ávísan mun til vega á kundaportalinum hjá IRF, men framvegis eru nakrar avbjóðingar á hesum økinum, sum vit arbeiða við. Vit eru m.a. í ferð við at flyta alla skráseting av burturkasti frá rúmd yvir í vekt.

Harumframt hevur IRF seinasta árið lagt nógva orku í at framleiða egnan $CO_2$-roknskap, sum eftir ætlan verður við í ársfrásøgnini fyri 2025. Við tølunum, sum IRF hevur fingið til vega, eru vit nú nógv klókari uppá tað útlát, sum stendst av flutningi og handfaring av ymisku burturkastsbólkunum í Føroyum, og skjótt verður gjørligt hjá vinnuni at fáa føroyskar útlátsfaktorar fyri burturkast til egnan $CO_2$-roknskap.

### Krøvini um burðardygd koma

Føroyskar fyritøkur byrja at merkja eftirspurningin frá kundum, íleggjarum og starvsfólkum um atlit til burðardygd, og tað er lítil ivi um, at um nøkur fá ár fara frágreiðingar um burðardygd at vera ein treyt fyri, at føroysku fyritøkurnar yvirhøvur kunnu vera við á altjóða marknaðum.

Tí er skilagott hjá føroyskum fyritøkum longu í dag at seta hol á hetta arbeiðið og at fara undir at skipa tað ítøkiliga arbeiðið við burðardygd. Hjá IRF arbeiða vit miðvíst fram ímóti at kunna veita neyðugu hagtølini og útlátsfaktorarnar á burturkastsøkinum.



# Stórar avleiðingar av skeivari skiljing

Vit mugu duga betri at skilja burturkast. Bæði fyri umhvørvið og fyri okkara egnu trygd – og ikki minst fyri øll tey starvsfólkini hjá IRF, sum hvønn dag gera eitt megnar arbeiði at handfara burturkastið hjá okkum øllum.

### Neyðugt at varpa ljós á evnið

Gjøgnum árið 2024 skrásetti IRF fleiri óhapp og nær-við-óhapp, sum stóðust av skeivari skiljing. Dømir vóru um, at eldur kyknaði bæði í IRF-bili og í bingjum. Eisini vóru dømir um starvsfólk, ið fingu skaða av hvøssum lutum, tá ið húsarhaldsposar vórðu heintaðir. Alt hendingar, sum kundu verið fyribyrgdar, um burturkastið hevði verið rætt skilt.

### Hví skulu vit skilja burturkastið?

Fyri arbeiðspláss er tað ein fíggjarlig sparing at skilja burturkastið betur, tí tað kostar minni at lata burturkast til endurvinningar enn at brenna ella tyrva tað.

Røtt skiljing snýr seg í stóran mun eisini um trygd. Um trygdina heima við hús hjá okkum øllum, og um trygdina hjá starvsfólkunum, sum handfara og flyta burturkast. Starvsfólkini eru týdningarmesta tilfeingið hjá IRF, og teirra trygd og arbeiðsumstøður eru høgt raðfestar.

Triðja orsøkin til, hví røtt skiljing skal uppraðfestast, er, at bæði í altjóða høpi og her heima verða alsamt fleiri krøv sett fyritøkum í sambandi við at skjalprógva, hvussu tær arbeiða við burðardygd, og tí er neyðugt at handfara burturkast á umhvørvisliga rættan hátt. Landspolitiskt verður eisini arbeitt við nýggjari kunngerð, ið skal leggja lunnar undir, at so nógv burturkast sum gjørligt verður endurnýtt og endurvunnið heldur enn brent ella tyrvt. Henda kunngerðin er eitt stórt stig rætta vegin á umhvørviskós Føroya, og kemur at krevja nógv av okkum øllum.

*Tá ein IRF-bilførari varnaðist, at roykur kom úr lastini, gjørdi hann skjótt av og vippaði alt burturkastið á eitt stórt parkeringspláss.*






# Almenn móttøka fyri Poul Andriasi Joensen

Í mai 2024 varð skipað fyri almennari móttøku í bygdarhúsinum í Leirvík í sambandi við, at Poul Andrias Joensen, stjóri í IRF, fór frá vegna aldur. Poul Andrias starvaðist hjá IRF í samfull 35 ár – frá 1. februar í 1989, tá ið brennistøðin á Hagaleiti varð tikin í nýtslu fyri fyrstu ferð, til mai 2024. Av hesum 35 árunum var hann stjóri seinastu 32 árini.

### Høvi at líta aftur

Til móttøkuna var allur salurin í bygdarhúsinum prýddur við myndum og tíðindagreinum um IRF – frá 1979, tá ið felagið varð sett á stovn, til 2024.

Tað var sera áhugavert og læruríkt at líta aftur á hesi 45 árini hjá felagnum, og flestu gestirnir fingu nógva tíð at ganga við at lesa mongu tíðindaskrivini og líta aftur við nógvu myndunum. IRF hevur lagt nógva arbeiðsorku í at savna saman og skipa alt hetta søguliga tilfarið. Eitt týdningarmikið arbeiði, sum er við til at tryggja, at søgan um burturkastsøkið og stóru menningina, sum hevur verið á økinum seinastu knapt hálvu øldina, ikki verður gloymd.

### Nevnd og starvsfólk takkaðu fyri

Til móttøkuna takkaðu nevnd, leiðsla og starvsfólk hjá IRF Poul Andriasi fyri hansara stóra íkast til IRF, har hann hevur slóðað fyri og gingið á odda á burturkastsøkinum í Føroyum.

Poul Andrias fekk handað málning, sum Sigrun Gunnarsdóttir hevur málað. Málningurin lýsir m.a., hvussu Poul Andrias hevur verið ein varði á grønu leiðini í Føroyum. Umhvørvið á málninginum er fevnt av tí grøna litinum, sum boðar frá lívi og vón. Liljan grør, og spurvurin hevur funnið sær hvíld á varðanum.







*Bygdarhúsið í Leirvík var pyntað við blómum og tilfari úr føroysku náttúruni.*





# 25 ára starvsdagur

Í mai 2024 varð hátíðarløta hildin í sambandi við, at Poul Karsten Klein hevði starvast hjá IRF í 25 ár. Familja, vinir og starvsfelagar vóru komin saman til eina hugnaligu løtu. Táverandi stjórin, Poul Andrias Joensen, helt røðu, har hann takkaði Poul Karsteni fyri hansara stóra íkast til IRF og handaði blómur og málning.

# Verkfall og eingin innsavning

15. mai 2024 fóru limirnir hjá Føroya Arbeiðarafelag í verkfall, og fyri IRF merkti hetta, at meira enn helvtin av øllum starvsfólkunum fóru í verkfall.

Í knappar fýra vikur var eingin innsavning av burturkasti frá húsarhaldum, fyritøkum, stovnum ella kommunalum endurvinningarplássum. Eisini steðgaði øll innsavning av rottangaevju, spillolju og oljudálkaðum vatni. IRF fekk undantak at heinta burturkast frá Sjúkrahúsverkinum og eldraøkinum, og til bráðfeingis rottangatømingar. Tá ið ein vika var farin, var einki burturkast eftir í køstinum, og vit sløktu ovnin á brennistøðini.

Meðan verkfallið vardi, varpaði IRF við fleiri lýsingaátøkum ljós á góð ráð fyri at minka um ruskið heima við hús, og um hvussu tú á besta hátt kundi goyma ruskið.



9. juni endaði verkfallið, og dagin eftir fóru øll IRF-starvsfólkini aftur til verka. Eyka starvsfólkaorka varð sett inn, soleiðis at vit fingu tikið alt húsarhaldsruskið longu fyrstu vikuna. Síðani varð farið til stovnar, virkir og kommunal endurvinningarpláss.

Starvsfólkini hjá IRF tóku í hesum tíðarskeiðinum eitt megnartak, tí sera nógv burturkast hevði hópað seg upp hesar vikurnar, og alt varð innsavnað og hagreitt upp á góðar tvær vikur.



# Tríggir nýggir bilar

Í 2022 bílegði IRF tríggjar nýggjar bilar til at heinta vinnuburturkast. Fyrsti kom seint í 2023, og hinir báðir komu í 2024. Nýggju bilarnir avloystu tríggjar eldri bilar, sum hava verið væl brúktir í nógv ár.

Nýggju bilarnir eru frá Volvo, og talan er um ein krókabil, ein pressubil og ein bil, sum bæði er krókabilur og pressubilur. Bilarnir eru sera framkomnir, bæði hvat viðvíkur trygdarskipan, økonomi og umhvørvi.



## Løðistøð á Hagaleiti

Fyrst í 2024 varð løðistøð til elbilar sett upp á Hagaleiti. Alsamt fleiri starvsfólk hjá IRF hava fylgt rákinum og skift til el-bil seinastu árini, og tí valdi IRF at gera hesa løðistøðina.

Starvsfólk og vitjandi annars gjalda sjálvi fyri nýtsluna, eins og tey gera á øðrum løðistøðum.



## Nýggjar rutur í Sandoynni

Eftir at nýggi Sandoyartunnilin varð tikin í nýtslu, hevur IRF yvirtikið innsavningina av burturkasti í oynni. Í mong ár hevur IRF annars havt ein fastan staðbundnan undirveitara til hetta.

Í byrjanini, tá ið IRF yvirtók, var innsavningin ikki nóg væl skipað, og hetta komst millum annað av, at yvirtøkan kom skjótari enn væntað. Tíðliga í 2025 vórðu ruturnar í Sandoynni tó lagdar í eina fasta legu hjá IRF, og nú kunnu sandoyingar vænta somu góðu tænastu sum restin av meginøkinum.



## Sigurd Leifsson Lamhauge nýggjur stjóri hjá IRF

Á sumri 2024 byrjaði Sigurd Leifsson Lamhauge sum stjóri hjá IRF. Sigurd er útbúgvin elektromekanikari og verkfrøðingur, og hevur útbúgving í leiðslu. Hann hevur starvast í nógvum ymiskum verkætlanum í Føroyum og uttanlands. Seinastu fimm árini hevur hann verið stjóri á Landsverki.

Sum stjóri hjá IRF hevur Sigurd evstu ábyrgd av felagnum, og hann ætlar framhaldandi at tryggja grønu kósina hjá IRF saman við leiðslu, deildarleiðarum og starvsfólkum annars.

> *Mær dámar væl at fáa nýggjar avbjóðingar og kenni meg hepnan at fáa møguleika at stjórna einum so spennandi arbeiðsplássi. IRF ger ein sjónligan mun í tí føroyska rúminum og hevur sett sera ambitiøs mál, m.a. at 50 % av burturkastinum skal endurvinnast áðrenn 2030. Eitt ítøkiligt mál, ið ikki krevur so lítið. Fyrst og fremst av okkara hugburði, men eisini av maskinum, starvsfólkum og skipanum av innheinting.*
>
> *Burturkast skal síggjast sum eitt tilfeingi, ið kann endurvinnast, og her hava vit eina beinleiðis ávirkan á eitt neutralt $CO_2$-útlát. Hetta er ein uppgáva, ið eingin klárar einsamallur, og tí er neyðugt við samstarvi millum nógvar partar. Eg eri sera spentur at kunna arbeiða við hesum økinum saman við dugnaliga starvsfólkahópinum hjá IRF, segði Sigurd L. Lamhauge.*




## Nýtt tilfar til børn um umhvørvi og burturkast

Eftir summarfrítíðina kom IRF við nýggjum, føroyskum tilfari um umhvørvis- og burturkastsøkið. Talan er um eitt blað til miðdeildina í fólkaskúlanum, og blaðið hevur til endamáls at økja um umhvørvistilvitið hjá næmingunum. Í blaðnum greiða vit frá um burturkastsøkið í Føroyum, um skiljing av burturkasti, og um hví vit yvirhøvur skulu skilja burturkast. Blaðið hevur eisini ymiskar uppgávur og praktiskar royndir, sum næmingarnir kunnu gera.

Allir fólkaskúlar í økinum hjá IRF hava fingið bjóðað blaðið sum ískoytistilfar til undirvísingina, og harumframt verður blaðið latið næmingum, sum koma á vitjan hjá IRF á Hagaleiti.

**Tey ungu eru framtíðin**

Hjá IRF arbeiða vit støðugt við at menna tilfar til børn og ung um burturkastsøkið. Hetta hevur havt høga raðfesting hjá IRF í fleiri ár. Í 2022 kom eitt blað út til forskúlar og skúlabólkar, umframt eitt familjuborðspæl.

**Alt tilfarið frá IRF kann umbiðjast ella takast niður av heimasíðuni hjá IRF.**



**irf.fo**








*Jarn og metal er virðismikið tilfeingi og skal ikki latast í gráa posan. Blikk og dósir brenna ikki í ovninum, og tí verða hesar jarnleivdir tyrvdar saman við øskuni frá brennistøðini.*

## Nýggjur lýsingarfilmur um at skilja jarn og metal

Í vetur kom nýggjur lýsingarfilmur frá IRF um týdningin av at skilja jarn og metal frá vanliga húsarhaldsruskinum. Filmurin er tann seinastu í røðini av fimm lýsingarfilmum frá IRF í afturkenniligum sniði, har ein suðuroyarkvinna leggur rødd til. Hinir filmarnar hava verið um gráa, hvíta og reyða posan, og um endurvinning av glasi.

### Hví skulu vit skilja blikk og dósir frá vanliga húsarhaldsruskinum?

Tað er sera týdningarmikið, at jarn og metal verða skild frá vanliga húsarhaldsruskinum, tí hesi kunnu endurvinnast fleiri ferðir, uttan at góðskan versnar. Til dømis kunnu dósir blíva til eina grýtu, ein billut ella eina nýggja súkklu.

Harumframt er tað nógv betri fyri umhvørvið at framleiða nýggjar lutir burtur úr endurvunnum tilfari enn burtur úr nýggjari rávøru, tí tað sera orkukrevjandi at útvinna jarn og metal úr náttúruni og hevur nógv $CO_2$-útlát við sær.

### Hvar fer tað?

Í 2024 sendi IRF 3.233 tons av jarni og øðrum metalum til endurvinningar uttanlands. Talan er um alt frá takplátum, komfýrum og radiatorum til súkklur, blikk og smáar skrúvur.







*Sigurd L. Lamhauge, stjóri í IRF, og Mortan Vang, stjóri í MTV Byggivirkið.*



# Nú byggja vit panthøllina

Stutt fyri jól 2024 varð sáttmáli undirskrivaður millum IRF og MTV Byggivirkið um byggingina av nýggju panthøllini hjá IRF í Sandavági, og byggingin er nú farin í gongd.

Nýggja pantskipanin er ein sera umfatandi verkætlan við nógvum áhugapørtum, men endamálið við skipanini er sera einfalt: Tað skal vera so lætt sum gjørligt fyri brúkaran at sleppa av við øll pantíløt á einum stað, soleiðis at so nógv íløt sum gjørligt koma aftur í ringrás heldur enn at fara burtur.

### IRF verður einasti pantumsitari í Føroyum

Í løtuni eru tólv pantumsitarar í Føroyum, og tað er ein av orsøkunum til, at tað við galdandi pantskipan er sera trupult hjá einum brúkara at sleppa av við øll síni pantíløt, tí hann noyðist til fleiri ymisk sølustøð. Við nýggju pantskipanini fara vit í Føroyum frá at hava tólv pantumsitarar til at hava ein – IRF.

Tá ið Umhvørvismálaráðið í 2023 heitti á okkum um at vera pantumsitari, fóru vit miðvíst til verka at leggja nýggju skipanina til rættis. Skipanin skal vera so brúkaravinarlig og praktisk sum gjørligt fyri brúkaran, og atlit skal takast til heilsølur, sølustøð og bryggjarí.

Samlaða pantverkætlanin verður mett at kosta um 50 mió. kr. íroknað høll, maskinútgerð og neyðug forrit.

### Panthøllin í Sandavági

Bygningurin í Sandavági verður góðar 1.000 fermetrar og skal m.a. rúma skiljimaskinum, goymslu, móttøku og fyrisiting, Fyrsta árið meta vit, at høllin fer at taka ímóti uml. 17 mió. íløtum, sum skulu hagreiðast og sendast til endurnýtslu og endurvinningar.

Tað er MTV Byggivirkið, sum er byggiharri, arkitektafyritøkan Henning Larsen hevur teknað bygningin, og PB Consult er høvuðsráðgevi.

Panthøllin skal standa klár tann 30. mars 2026.



## Nógvar vitjanir á Hagaleiti í 2024

Hjá IRF merkja vit væl, at umhvørvistilvitið og hugburðurin hjá føroyingum er í stórari broyting. Hetta sæst m.a. aftur í, at talið av vitjandi á Hagaleiti hækkar á hvørjum ári. Tey vitjandi eru alt frá barnagarðsbørnum og fólkaskúla- og miðnámsnæmingum til ymiskar bæði størri og smærri fyritøkur og stovnar.

Hjá IRF gera vit nógv burturúr at møta teimum vitjandi, har tey eru. Vit miðja altíð eftir at gera vitjanina spennandi og minnisverda. Málið er, at gestirnir fara til hús við einari kenslu av, at tey hava lært nakað, og at vit øll kunnu gera ein mun fyri umhvørvið.

At greiða børnum og ungum frá týdninginum av at skilja burturkastið rætt, og um týdningin av at síggja tað virðismikla tilfeingið í burturkasti okkara, er ein tann týdningarmesti og mest meiningarfulli parturin av arbeiði okkara í IRF.

Hjá IRF taka vit gleðiliga ímóti teimum mongu vitjandi, sum vilja vita meira um burturkast. Í 2024 vóru tað **749 børn og ung**, sum vitjaðu ella fingu vitjan av IRF, umframt **42 arbeiðspláss** við tilsamans **279 starvsfólkum**.



*IRF á vitjan í skúlanum í Trongisvági, har fleiri enn 100 sera spent børn lærdu um umhvørvi, burturkast og skiljing, og fingu høvi at spyrja um mangt og hvat.*



## Nýggj framsýningarrør

Í 2024 komu trý nýggj framsýningarrør at standa í forhøllini hjá IRF á Hagaleiti. Tey vísa, hvussu vit skulu skilja burturkast í gráa, hvíta og reyða posa. Tað er sera gevandi fyri børnini at síggja hesa ítøkiligu skiljingina av vanliga húsarhaldsruskinum, og tað kemur meira enn so fyri, at fleiri av teimum vaksnu, sum ganga fram við rørunum, eisini læra okkurt.

Vit arbeiða støðugt við at menna vitjanarkonseptið og at gera tað læruríkari, og á hvørjum ári legst okkurt nýtt afturat.

## IRF á fleiri tiltøkum kring landið

Umframt at støðirnar hjá IRF fáa alsamt fleiri vitjanir, er eisini vaksandi eftirspurningur eftir IRF til ymisk tiltøk kring landið. Í 2024 hevur IRF m.a. luttikið á:

- **Kunningartiltaki fyri lesandi á Miðnámi á Kambsdali**
- **Tiltaki um burturkast og vanar, sum Rudda Føroyar skipaði fyri**
- **Tiltaki hjá Vinnuhúsinum um burturkast, ringbúskap og burturkastshagtøl**
- **Tiltaki um burturkast og skiljing í Vága kommunu í sambandi við “Undirfagra mai”**



Tað er altíð stuttligt at vera partur av tílíkum tiltøkum. Nógvar eldhugaðar umhvørvissálir eru til verka kring landið, og tað er av størsta áhuga hjá okkum í IRF at hitta hesi fólkini, at hoyra um verkætlanir teirra og at fáa í lag møgulig samstarv.

*Kvinnudagurin 8. mars 2024 varð hátíðarhildin við, at allar kvinnurnar hjá IRF vóru í ljósareyðum klæðum.*



# Ljósareyður dámur *á Hagaleiti 8. mars*

Hóast tað í 2025 eru 50 ár síðani, at ST lýsti 8. mars at vera altjóða kvinnudagur, er tað enn eins týdningarmikið, at dagurin verður markeraður. Tað er neyðugt at varpa ljós á ymisk viðurskifti, sum hava týdning fyri at røkka málinum um javnstøðu millum kynini. Javnstøða er bæði ein grundleggjandi mannarættur og ein fortreyt fyri eitt framkomið samfelag.

Kvinnudagin 8. mars í 2024 vóru allar kvinnurnar á Hagaleiti í ljósareyðum klæðum. Ein felagsmynd varð tikin frammanfyri einari ljósareyðari bingju, sum hóskaði sera væl til høvið. Í løtuni eru 23 kvinnur í føstum starvi hjá IRF, og hetta svarar til 24 % av starvsfólkahópinum. Flestu av hesum eru í fyrisitingini, men nakrar starvast eisini á móttøkustøðum og í bilum. Miðalaldurin hjá IRF-kvinnunum er 46 ár, og kvinnan, sum hevur verið longst í starvi hjá IRF, er Súsanna Joensen, sum hevur starvast hjá IRF í 35 ár.

**95**
**starvsfólk**
*í føstum starvi*





**9,2 ár**
Miðalstarvsaldur





# Hesi eru IRF

**7 ymisk**
*fakfeløg*

*Starvsfólka-hópurin*
**2024**





**Miðalaldur**
**47,6 ár**



**8,4 %**
Starvsfólkaumferð



**76 %**
*menn*

**24 %**
*kvinnur*




*Úti í Hestí*











# Starvsfólkahópurin 2024

**Starvsfólk**
Við ársenda í 2024 vóru tilsamans 95 fólk í føstum starvi hjá IRF. Talið er roknað sum tal av høvdum. Tímaløntir avloysarar eru ikki taldir við. Fleiri enn 60 avloysarar vóru tilsamans í 2024.

Í 2024 hava vit havt eina starvsfólkaumferð á 8,4 %. Av hesum eru trý starvsfólk farin frá fyri aldur, og fimm eru farin í annað starv. Starvsfólkaumferðin er roknað út frá starvsfólkum, ið eru farin, býtt við samlaða talið av starvsfólkum við ársenda 2024.

**Kynsbýti**
Kynsbýtið hjá IRF er 76 % menn og 24 % kvinnur. Seinastu trý árini er kvinnuumboðanin kvinkað 1 % uppeftir hvørt ár. Tað sæst aftur, at vit nú eisini hava kvinnuligar bilførarar og maskinførarar. Í ovastu leiðsluni er kynsbýtið 75 % menn og 25 kvinnur %.

**Miðalaldur**
Miðalaldurin fyri starvsfólkahópin er 47,6 ár. 25 % av starvsfólkunum eru 60 ár og eldri. Aldursspennið er 20-73 ár.

**Sjey fakfeløg**
Starvsfólkini hjá IRF eru sett eftir sjey ymiskum sáttmálum, og fleiri enn helvtin av starvsfólkunum eru sett eftir sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag.

**Starvsaldur**
Miðalstarvsaldurin hjá IRF er 9,2 ár. Ein triðingur av starvsfólkunum hevur starvast í 10 ár ella longur hjá IRF, og knapt fimtihvør (18 %) hevur starvast hjá IRF í 20 ár ella longur.

## Aldur




## Starvsaldur




**Starvsøkir**
Býta vit starvsfólkahópin út á starvsøkir, er størsti bólkurin innsavning. 43 % av starvsfólkum okkara taka sær av innsavningini av burturkasti kring allar oyggjarnar. Eftir ávikavist fastari rutu og tilkalling eru starvsfólkini hjá okkum hvørja viku í hvørjum einstøkum túni, og regluliga á øllum skúlum, stovnum og fyritøkum, har vit heinta burturkast og tøma rottangar.

Í ritmyndini til høgru fevnir fyrisiting um leiðslu, kundatænastu, bókhald, lønir, KT, HR, marknaðarføring og samskifti. Móttøkustøðirnar hjá okkum eru umlastingarstøðin í Trøllavík, jarnmóttøkan á Gjánoyri, endurvinningarhøllin og serhøllin á Hagaleiti. Viðgerð av burturkasti fevnir um brennistøðina, oljureinsiverkið, tyrvimóttøkuna og reinsiverkið í Nýggjheiðum.

Verkstað og reingerð umfatar verkstaðið í Klaksvík, reingerð av bygningum og matgerð.




## Starvsøkir

- Fyrisiting
- Innsavning
- Móttøkustøð
- Viðgerð av burturkasti
- Verkstaður og reingerð


*Á Gøtunestindi í dýrdarveðri eitt summarkvøld*

# Gerandishetjur

Starvsfólkini á burturkastsøkinum kunnu lýsast sum ósjónligar hetjur, ið hvønn dag tryggja, at vælferðarsamfelagið og tess tænastur rigga.

Starvsfólkini á burturkastsøkinum eru farin frá at vera ein ógáað arbeiðsmegi til í størri mun at vera viðurkend sum gerandishetjur. Starvsfólkini hjá IRF spæla ein avgerandi leiklut í menningini av einum burðardyggari samfelagi, og hetta arbeiðið hevur uppiborið bæði virðing og viðurkenning.

Meðan limirnir í Føroya Arbeiðarafelagi vóru í verkfalli í 2024, var tað sera týðiligt, at tað innsavningararbeiðið, sum verður gjørt, hevur týdning fyri hvønn einstakan borgara, og tað merkist skjótt, tá ið arbeiðið verður lagt niður.

”

*Hjá IRF síggja vit, at tá ið vit søkja eftir starvsfólki, eru tað alsamt fleiri, ið hava hug at starvast hjá okkum, hóast arbeiðsloysið í Føroyum er metlágt. Hetta er gleðiligt og vísir, at fólk fegin vilja gera ein mun og vera partur av loysnini at betra um umhvørvis- og veðurlags-avbjóðingarnar.*

**Suffía Høj**
HR-leiðari hjá IRF















**Ein arbeiðsmarknaður í broyting**
Hjá IRF merkja vit, at tað unga ættarliðið, sum kemur út á arbeiðsmarknaðin í dag, setir øðrvísi krøv til leiðarar, enn starvsfólk áður hava gjørt. Tey vænta góða innleiðslu, støðuga afturboðan og eina góða javnvág millum arbeiðs- og familjulív. Hjá IRF hava vit seinasta árið umskipað bygnaðin, soleiðis at tað er tættari samband ímillum starvsfólk og nærmasta leiðara, og soleiðis at leiðsluspennið verður minni á fleiri økjum.

”

*Eg sendi eina sjálvboðna umsókn til IRF, tí eg hevði hoyrt, at tey møguliga manglaðu ein bilførara. Avloysarastarvið bleiv til eitt fast starv, og eg trívist væl hjá IRF. Eg hugsi faktiskt ikki so nógv um, at flestu starvsfelagarnir eru menn. Teir hava tikið væl ímóti mær og eru altíð klárir, um eg havi brúk fyri hjálp ella ráðum.*

*Hóast tú sum bilførari arbeiðir nógv sjálvstøðugt, so er gott samanhald og samstarv millum okkum, og tað er altíð hugnaligt at koma út á støðina á Hagaleiti ella á verkstaðið í Klaksvík til eitt gott kaffiprát.*

**Eskilda Bjarnadóttir**
bilførari hjá IRF



*Í Tindhólmi*

> *Tað hevur verið sera spennandi at fara frá at vera starvsfólk til at vera leiðari. Førleikamenning sum heild verður raðfest høgt hjá IRF. Bæði førleikamenning av leiðarum, men ikki minst eisini av fólkunum á gólvinum. Hetta er við til at gera, at starvsfólk trívast og verða verandi. Tað er lætt at blíva leiðari, tá ið starvsfólkini undir tær eru dugnalig og hava starvast hjá felagnum í nógv ár.*
>
> **Hanus Árnason Lervig**, leiðari á oljureinsiverkinum og serhøllini hjá IRF

### Starvsfólkamenning

Vit eru í einum ættarliðskifti hjá IRF, har fleiri roynd starvsfólk seinastu árini hava givið stafettina víðari til eitt nýtt ættarlið. Hetta skapar bæði møguleikar og avbjóðingar, tí vit skulu tryggja, at vitan og royndir verða latin víðari, samstundis sum tíðin krevur, at vit ogna okkum uppaftur fleiri førleikar.

Burturkastskunngerðin, sum er ávegis, og nýggja pantskipanin koma at seta krøv til nýggjar førleikar, og tí er týdningarmikið, at vit áhaldandi gera íløgur í læring og menning, soleiðis at hesi eru í samsvar við tann tørvin, sum vit koma at hava hjá IRF.

Í 2024 hava vit eisini lagt okkum eftir áhaldandi at førleikamenna starvsfólkini. Yvirskipað hevur førleikamenningin hjá IRF í 2024 koyrt eftir tveimum sporum: **Umhvørvi og trygd.**

## Umhvørvi

At tryggja eitt reint og burturkastsfrítt umhvørvi er tilverugrundarlagið hjá IRF, men somuleiðis er tað eisini neyðugt, at vit sum arbeiðspláss ganga undan og raðfesta skeið og menning innan burðardygd. Við at styrkja vitanina hjá starvsfólkunum kunnu vit saman viðvirka til eitt burðardyggari umhvørvi – bæði innanhýsis og í samfelagnum sum heild.

### Grønur hósmorgun

Á heysti í 2024 byrjaði nýggi tátturin 'Grønur hósmorgun' hjá IRF. Fyrsta hósdagin í hvørjum mánaði fáa starvsfólkini hjá IRF í sambandi við felags morgunmat møguleika at hoyra stutt upplegg um alskyns spennandi evnir. Talan er um evnir, sum geva starvsfólkunum nýggja vitan ella íblástur, evnir við einum grønum innihaldi, ella evnir um, hvussu IRF kann gerast eitt uppaftur betri arbeiðspláss.

### Blómuprýðisverkstova

Hjá IRF royna vit á hvørjum ári at hava eitt starvsfólkatiltak, sum tekur útgangsstøði í tí føroyska og eggjar til ein burðardyggari lívsstíl. Seinastu árini hava vit m.a. skipað fyri felags eplaveltu, tálgaverkstovu, verkstovu at sáa grønmeti, og fyrilestri um at gagnnýta avroð frá seyði.

Í 2024 varð skipað fyri verkstovu at gera blómuprýði, har tað mesta av tilfarinum, sum varð nýtt, var føroyskt. Lina Hanssen, blómuprýðari, greiddi frá um burðardygd og um hvussu vit í størri mun kunnu brúka, turka og goyma alt tilfarið, sum er í Føroyum. Starvsfólkini sluppu sjálvsagt eisini at royna seg í blómuprýðisfakinum.

### Skeið í serburturkasti

Í samstarvi við Kommunalu brennistøðina á Hjalla og Stena Recycling varð í heyst skipað fyri víðkaðum skeiði í vandamiklum burturkasti og trýstfløskum.

Undirvísingin snúði seg millum annað um, hvussu ymisk sløg av trýstfløskum skuldu flokkast og handfarast víðari á besta hátt – bæði í mun til trygd og í mun til umhvørvi. Eitt sera áhugavert skeið við nógvum lærdómi til starvsfólkini.

## Trygd

Arbeiðsumhvørvi og trygd hava høga raðfesting hjá IRF, og tí hava vit áhaldandi fokus á at fyriskipa skeið innan trygd. Við kunningarátøkum er eisini neyðugt regluliga at minna borgarar og vinnu á vandan, ið kann standast av skeivari skiljing, so sum hvassir lutir í húsarhaldsposum ella battarí í bingjum.

### Øll starvsfólk á skeið í lívbjargandi fyrstuhjálp og eldsløkking

Annaðhvørt ár luttaka øll starvsfólk hjá IRF á heildagsskeiði í lívbjargandi fyrstuhjálp. Í 2024 snúði skeiðið seg eisini um eldsløkking, har starvsfólkini m.a. sluppu at royna at sløkkja eld.

### Tað skal vera trygt at fara til arbeiðis

Starvsfólkini eru týdningarmesta tilfeingið hjá IRF, og tí skal tað sjálvsagt vera trygt at fara til arbeiðis. Í 2024 hava vit gjørt eina nýggja innanhýsis vegleiðing fyri handfaring av skaðum, um ein t.d. hevur skorið seg.

Vit hava eisini havt undirvísing í heilsu, trygd og reinføri við tí endamáli at greiða starvsfólkunum frá týdninginum av at ansa eftir sær sjálvum og starvsfeløgum sínum.

Harumframt hava nøkur starvsfólk verið á skeiði um rakstur og viðlíkahald av sjálvvirkandi brandskipanum.

### Skeið í KT-trygd

Í desember vóru 30 starvsfólk hjá IRF á grundskeiði í KT-trygd. Endamálið við skeiðnum var at geva starvsfólkunum góð ráð um, hvussu ein kann verja seg ímóti alsamt snildari teldusníkum og vaksandi hóttanum á netinum. Í einum skjótt broytiligum talgildum heimi er tað krav, at vit sum arbeiðspláss hava tamarhald á KT-trygdini, og her er tilvitskan hjá hvørjum einstøkum starvsfólki ein avgerandi liður í at megna ta uppgávuna.

Við føroyskum dømum lærdu starvsfólkini hjá IRF um ymisk sløg av álopum og um at stovna trygg loyniorð. Tey fingu eisini góð ráð um, hvussu tey kunnu tryggja bæði telefonir og teldur sínar best møguligt.



# HAGTØL 2024

Alt burturkast, sum IRF tekur ímóti, verður viðgjørt eftir trimum høvuðsháttum: Endurvinning, brenning ella tyrving. Endurvinningarburturkast er burturkast, ið kann endurvinnast til nýggjar vørur, t.d. papp ella jarn. Burturkast, ið ikki kann endurvinnast, t.d. blandað húsarhaldsrusk, verður brent, og ein partur av hitanum frá brenningini verður orkuútvunnin og nýttur til fjarhita. Burturkast, ið hvørki kann endurvinnast ella brennast, t.d. gips, verður tyrvt. IRF arbeiðir fyri, at so nógv burturkast sum gjørligt verður endurvunnið, í aðru atløgu brent, og um tað ikki ber til, so verður burturkastið tyrvt. Samstundis kunnar IRF borgarar og viðskiftafólk um fyribyrging, endurnýtslu og skiljing av burturkasti.

Í 2024 tók IRF ímóti 36.113 tonsum av burturkasti. 8.678 tons vórðu endurvunnin, 22.982 tons vórðu brend, og 4.453 tons vórðu tyrvd (talva 1). Nøgdirnar tilsamans eru hækkaðar eitt lítið vet seinasta árið, men liggja tó framvegis undir miðal fyri seinastu fimm árini. Nøgdirnar til tyrvingar liggja yvir miðal fyri seinastu fimm árini, meðan nøgdirnar at brenna og at endurvinna liggja undir miðal.

**Talva 1**- Burturkastnøgdir árini 2020-2024. Fyri at kunna samanbera hagtøl eru summi tøl umroknað frá m³ til tons.
Ein partur av nøgdunum til endurvinningar er skrásettur ísv. útflutning og ikki móttøku.

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Endurvinning | 7.640 | 10.078 | 8.070 | 9.093 | 8.678 | 8.712 |
| Brenning | 24.728 | 25.012 | 23.359 | 23.015 | 22.982 | 23.819 |
| Tyrving | 4.316 | 3.191 | 2.550 | 3.786 | 4.453 | 3.659 |
| **Tilsamans** | **36.684** | **38.282** | **33.979** | **35.894** | **36.113** | **36.190** |

**Ritmynd 1 -** Lutfalsliga býtið í % millum endurvinning, brenning og tyrving í 2024.

- Endurvinning
- Brenning
- Tyrving




Ein týðandi broyting er gjørd í tølunum fyri endurvinning, tí í undanfarnum ársfrásagnum varð reinsaða vatnið á oljureinsiverkinum tikið við sum endurvunnið tilfar, men í hesi ársfrásøgn og framyvir verður reinsaða vatnið ikki tikið við. Hetta broytir samstundis samlaðu burturkastsnøgdirnar og býtið millum viðgerðarhættirnar. Um tað reinsaða vatnið hevði verið tikið við í samlaðu hagtølunum í hesi ársfrásøgnini, hevði býtið í ritmyndini omanfyri verið: Endurvinning 31,3 %. brenning 57,5 % og tyrving 11,2 %.

**Ritmynd 2**
Lutfalsliga býtið í % millum endurvinning, brenning og tyrving seinastu fimm árini.




## Hvaðani kemur burturkastið?

IRF tekur ímóti burturkasti frá húsarhaldum, kommunalum endurvinningarplássum (bingjuplássum), vinnulívi og Tórshavnar kommunu. Seinasta árið er fólkatalið í limakommununum hjá IRF hækkað við 70 fólkum, og talið av húskjum er hækkað við 17. Tað eru enn 41 kommunal endurvinningarpláss tilsamans í limakommununum hjá IRF.

20 nýggjar fyritøkur og stovnar vórðu skrásett hjá IRF í 2024, og nú er samlaða talið komið upp á 592 (talva 2). Viðskiftafólkini hjá IRF fevna um alivinnuna, fiskivinnuna, byggivinnuna, landbúnaðarvinnuna, flutnings- og tænastuvinnuna, eins og almennar og kommunalar stovnar.

Ein stórur partur av tí burturkastinum, sum IRF tekur ímóti, kemur ikki bert frá limakommununum hjá felagnum, men úr øllum landinum. Sum dømi kann nevnast, at oljureinsiverkið hjá IRF tekur ímóti spillolju úr øllum landinum, og harumframt samstarva IRF og KB (Kommunala brennistøðin á Hjalla) um eitt nú móttøku av pappi og pappíri. Nýggja støðin hjá IRF í Nýggjheiðum tekur somuleiðis ímóti tyrviburturkasti og rottangaevju úr øllum landinum og ímóti ilsku frá báðum brennistøðunum.

**Talva 2** – Fólkatal, húskir og kommunal endurvinningarpláss í IRF-økinum, umframt vinnukundar úr øllum Føroyum. Talvan vísir tølini við ársenda í árinum.

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal | 30.559 | 30.926 | 31.198 | 31.303 | 31.373 |
| Húski | 10.906 | 11.008 | 11.108 | 11.188 | 11.205 |
| Kommunal endurvinningarpláss | 41 | 41 | 41 | 41 | 41 |
| Vinnukundar | 550 | 541 | 538 | 572 | 592 |

Í teimum 28 limakommununum hjá IRF eru tilsamans 41 kommunal endurvinningarpláss. Tað eru limakommunurnar, sum eiga og reka tey kommunalu plássini, 21 kommunur hava eitt endurvinningarpláss, fimm kommunur hava tvey pláss og tvær kommunur hava fimm pláss. Endurvinningarplássini eru sera ymisk í støðd. Tey stóru plássini eru umleið 1.000-3.000 m$^2$ til støddar, meðan tey smáu plássini eru á leið 50-100 m$^2$. Umstøðurnar á plássinum og møguleikarnir at skilja eru sostatt sera ymisk. Fleiri av plássunum áttu at fingið hægri raðfesting hjá avvarðandi kommunum og verið betur skipað komandi árini.

**Talva 3**- Móttikið burturkast á kommunalu plássunum kring landið 2020-2024

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Burturkast móttikið frá endurvinningarplássum, tons | 11.833 | 9.362 | 8.605 | 8.731 | 8.725 | 9.451 |
| Burturkast frá borgarum, kg | 387 | 303 | 276 | 279 | 278 | 305 |

Tey 41 endurvinningarplássini lótu tilsamans 8.725 tons av burturkasti til IRF í 2024 (talva 3). Tað samsvarar við, at hvør borgari í limakommununum hjá IRF í miðal læt plássunum 278 kg av burturkasti í 2024.

Á kortinum niðanfyri (mynd 1) sæst staðsetingin av teimum 41 kommunalu endurvinningarplássunum hjá limakommununum hjá IRF.



## Endurvinning

Talva 4 vísir samlaðu nøgdirnar av tí, sum IRF savnaði inn til endurvinningar í 2024. Hvør bólkur sær er útgreinaður í talvunum 6-14.

Bæði borgarar, kommunur og vinna skulu duga betur at at skilja endurvinningartilfar frá burturkastinum, sum skal brennast ella tyrvast. IRF skal áhaldandi arbeiða við at økja um nøgdirnar av burturkasti til endurvinningar og víðka um tilboðið av burturkastsbólkum, sum kunnu latast til endurvinningar. Í flestu førum krevja slík átøk økta fígging, tí flutningsútreiðslurnar økjast, og somuleiðis økjast útreiðslurnar til høli, útgerð og starvsfólk.

**Talva 4** – Burturkastsnøgdir, sum IRF tók ímóti til endurvinningar í 2020-2024. Hetta eru bruttonøgdir áðrenn viðgerð.

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar uttanlands (tils.)** | **6.029** | **8.306** | **7.179** | **7.819** | **7.689** | **7.404** |
| Jarn og metal | 2.233 | 4.128 | 2.684 | 3.095 | 3.233 | 3.075 |
| Papp og pappír | 2.464 | 2.658 | 2.597 | 2.605 | 2.481 | 2.561 |
| Plast | 867 | 1.194 | 1.262 | 1.620 | 1.546 | 1.298 |
| Serburturkast | 205 | 145 | 412 | 230 | 206 | 239 |
| Elektronikkur og káplar | 191 | 151 | 132 | 148 | 128 | 150 |
| Glas | 0 | 11 | 27 | 36 | 42 | 23 |
| Matolja | 10 | 10 | 32 | 0 | 0 | 17 |
| Annað | 60 | 9 | 34 | 86 | 53 | 48 |
| **Til viðgerðar innanlands (tils.)** | **6.114** | **5.864** | **5.478** | **6.066** | **5.501** | **5.805** |
| Olja og oljudálkað vatn | 6.114 | 5.864 | 5.478 | 6.066 | 5.501 | 5.805 |
| **Tilsamans** | **12.143** | **14.170** | **12.656** | **13.886** | **13.190** | **13.209** |

**Talva 5** – Burturkastsnøgdir, ið vórðu endurvunnar í 2020-2024. Hetta eru nettonøgdirnar av burturkastinum eftir viðgerð.

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Jarn og metal | 2.204 | 4.059 | 2.644 | 3.095 | 2.799 | 2.960 |
| Papp og pappír | 2.464 | 2.658 | 2.597 | 2.586 | 2.481 | 2.557 |
| Plast | 867 | 1.194 | 1.262 | 1.583 | 1.539 | 1.289 |
| Serburturkast | 134 | 125 | 128 | 105 | 134 | 125 |
| Elektronikkur og káplar | 157 | 123 | 104 | 99 | 98 | 116 |
| Glas | 0 | 11 | 27 | 36 | 42 | 23 |
| Matolja | 10 | 10 | 32 | 0 | 0 | 10 |
| Reinsað olja | 1.805 | 1.897 | 1.276 | 1.589 | 1.586 | 1.631 |
| **Tilsamans** | **7.640** | **10.078** | **8.070** | **9.093** | **8.678** | **8.712** |

## Útflutningur

IRF sendir nógvar ymiskar burturkastsbólkar til viðgerðar uttanlands. Meginparturin fer til endurvinningar, men partar av ávísum serliga dálkandi burturkastsbólkum verða brendir ella tyrvdir uttanlands. Av øllum burturkastinum, sum IRF sendir av landinum til endurvinningar, er ein lítil partur, sum orsakað av dálking ella skeivari skiljing ikki verður endurvunnin, men í staðin brendur ella tyrvdur.

Hjá IRF merkja vit stóran áhuga frá bæði borgarum, fyritøkum og ikki minst næmingum, sum vilja vita, hvar burturkastið endar, og hvussu IRF kann tryggja, at burturkastið verður viðgjørt á umhvørvisliga bestan hátt. IRF arbeiðir miðvíst við at fylgja útflutta burturkastinum og at fáa so væl útgreinað hagtøl sum gjørligt. Hetta verður gjørt fyri at kunna skjalprógva veruliga endurvinningarpartin og á tann hátt støðugt arbeiða við at menna henda partin. Talva 6 vísir, hvussu stórur partur av tí, sum IRF sendi uttanlands til endurvinningar, í roynd og veru varð endurvunnin.

**Talva 6** – Burturkastsnøgdir, sum IRF sendi til endurvinningar/viðgerðar uttanlands 2020-2024 (tons).

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Endurvinning | 5.825 | 8.171 | 6.762 | 7.503 | 7.092 | 7.071 |
| Brenning | 193 | 118 | 396 | 260 | 522 | 298 |
| Tyrving | 11 | 17 | 21 | 56 | 75 | 36 |
| **Tilsamans** | **6.029** | **8.306** | **7.179** | **7.819** | **7.689** | **7.404** |

JARN OG METAL

## Jarn og metal

Eins og undanfarin ár er størsti parturin av endurvinningarburturkastinum jarn og metal. Í 2024 útflutti IRF 3.233 tons av jarni og metalum tilsamans til endurvinningar (talva 7). Í 2024 vórðu 2.665 tons av jarni útflutt, sum er nakað oman fyri miðaltalið fyri seinastu fimm árini.

Í 2024 tók IRF ímóti bilvrakum, ið svara til 517 tons. Øll bilvrak, sum IRF tekur ímóti, verða send til Kommunalu brennistøðina á Hjalla til umhvørvisviðgerð, áðrenn tey verða send av landinum til endurvinningar.

Í 2024 útflutti IRF 21 tons av øðrum metalum enn jarn, herundir kopar, aluminium, blýggj og rustfrítt stál. Søluprísurin fyri hesi metal er hægri enn prísurin fyri jarn, og tí loysir tað seg bæði umhvørvisliga og fíggjarliga at virðisøkja hesi metalini.

Í 2024 útflutti IRF 30 tons av aluminiumsdósum frá pantskipanini til endurvinningar. Tað svarar nøkulunda til miðaltalið seinastu fimm árini.

**Talva 7** – Jarn og metal til endurvinningar 2020-2024 (tons). Miðalvektin á bilvrakum í hagtølunum er ásett at vera 1.2 tons.

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Jarn | 1.436 | 3.403 | 1.993 | 2.425 | 2.665 | 2.384 |
| Bilvrak | 710 | 641 | 598 | 607 | 517 | 615 |
| Annað metal | 60 | 58 | 62 | 34 | 21 | 47 |
| Aluminiumsdósir | 27 | 26 | 31 | 29 | 30 | 29 |
| **Tilsamans** | **2.233** | **4.128** | **2.684** | **3.095** | **3.233** | **3.074** |

PAPP OG PAPPÍR

### Pappír og papp

Endurvinningarhøllin á Hagaleiti tekur ímóti pappíri og pappi úr øllum landinum. Her skal viðmerkjast, at nøgdirnar av pappi og pappíri úr Tórshavnar kommunu eisini eru roknaðar við í hagtølini hjá IRF. Í 2024 var samlaði útflutningurin 2.481 tons, sum er eitt vet minni enn miðaltalið fyri seinastu fimm árini (talva 8).

Tað er ymiskt, hvussu ofta ymisk tilfeingi kunnu endurvinnast. Papp og pappír kunnu endurvinnast til nýggjar pappírsvørur 7-10 ferðir.

**Talva 8** – Nøgdir av pappi og pappíri til endurvinningar 2020-2024 (tons).

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Pappír | 529 | 585 | 548 | 333 | 280 | 455 |
| Papp | 1.935 | 2.072 | 2.049 | 2.272 | 2.201 | 2.106 |
| **Tilsamans** | **2.464** | **2.658** | **2.597** | **2.605** | **2.481** | **2.561** |

BLEYTT PLAST

### Plast

IRF er ment nógv seinastu árini, tá ið tað snýr seg um plastendurvinning, og eingin ivi er um, at IRF gongur á odda á hesum økinum í Føroyum.

Í 2024 útflutti IRF 1.546 tons av plasti til endurvinningar (talva 9). Hetta er væl oman fyri miðaltalið seinastu fimm árini. Nøgdin av graslíki øktist í 2024, men nøgdirnar av hinum plastbólkunum eru minkaðar. Hetta kemst partvíst av, at fleiri privatar føroyskar fyritøkur eru komnar inn á marknaðin. Summar endurvinna tilfarið í Føroyum, meðan aðrar útflyta og selja endurvinningartilfar.

**Talva 9** – Plast til endurvinningar 2020-2024 (tons).

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Trol. trossar og net | 278 | 257 | 229 | 348 | 269 | 276 |
| Stórsekkir (PP) | 277 | 392 | 381 | 424 | 311 | 357 |
| Aliringar og fóðurslangur (HDPE) | 140 | 133 | 216 | 104 | 96 | 138 |
| Pantfløskur (PET) | 94 | 97 | 112 | 131 | 119 | 110 |
| Bleytt vøruplast (LDPE) | 73 | 87 | 113 | 107 | 79 | 92 |
| Annað hart plast | 5 | 18 | 0 | 0 | 0 | 5 |
| Graslíkisvøllir | 0 | 211 | 211 | 506 | 671 | 320 |
| **Tilsamans** | **867** | **1.194** | **1.262** | **1.620** | **1.546** | **1.298** |



SERLIGA DÁLKANDI BURTURKAST

### Serburturkast

Serburturkast er burturkast, sum inniheldur serliga dálkandi evni. Fleiri av hesum burturkastsbólkunum eru vandamiklir at handfara, skaðiligir fyri fólk og fæ, og sera dálkandi, um teir enda í náttúruni.

Nakað av serburturkasti verður brent á góðkendum brennistøðum í útlondum, og aðrir bólkar verða partvíst endurvunnir. Til dømis verða 65 % av spreydósunum, sum IRF sendir av landinum, endurvunnin, 67 % av battaríunum og 83 % av ljósperunum.

Samanlagt sendi IRF 206 tons av burturkasti til serviðgerðar í 2024 (talva 10). Flestu bólkarnir av serburturkasti halda seg nøkulunda á miðalvirðinum fyri seinastu fimm árini.

**Talva 10 – Mongdir av serburturkasti 2020-2024 (tons).**

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Evja frá nótavaski | 50 | 0 | 264 | 99 | 49 | 92 |
| Køli- og frystiskáp | 71 | 73 | 73 | 58 | 84 | 72 |
| Akkumulatorar | 64 | 48 | 48 | 57 | 48 | 53 |
| Trýstfløskur | 4 | 4 | 9 | 2 | 4 | 4 |
| Battaríir | 8 | 10 | 8 | 4 | 8 | 8 |
| Kemikaliuburturkast | 3 | 4 | 4 | 7 | 7 | 5 |
| Ljósperur | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 |
| Spreydósir | 2 | 3 | 2 | 1 | 3 | 2 |
| Fýrverk | 1 | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 |
| **Tilsamans** | **205** | **145** | **412** | **230** | **206** | **239** |

ELEKTRONIKKUR

### Elektronikkur

Í 2024 útflutti IRF 128 tons av elektronikki og káplum til endurvinningar (talva 11). Av hesum vóru 107 tons elektronikkur og 21 tons káplar. Nøgdin liggur væl niðan fyri miðalvirðið fyri seinastu árini.

Tað er sera týdningarmikið, at elektronikkur og káplar, sum innihalda nógv metal, verða skild frá til endurvinningar. Talan er um virðismikið tilfeingi, sum kann endurvinnast fleiri ferðir.

**Talva 11** – Mongdir av elektronikki og káplum til endurvinningar 2020-2024 (tons).

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Elektronikkur | 138 | 110 | 110 | 111 | 107 | 116 |
| Káplar | 53 | 40 | 22 | 37 | 21 | 34 |
| **Tilsamans** | **191** | **151** | **132** | **148** | **128** | **150** |

## Glas

Sum talva 12 vísir, hevur nøgdin av húsarhaldsglasi til endurvinningar verið støðugt vaksandi, síðani IRF byrjaði at senda henda bólkin av landinum í 2021. Í 2024 tóku 24 av teimum 41 kommunalu plássunum kring landið ímóti glasi frá borgarunum. Hetta eru nøkur pláss fleiri enn í 2023, men enn er møguleiki fyri betringum á hesum økinum.

Umhvørvisliga loysir tað seg sera væl at endurvinna glas, tí at framleiða vørur úr endurvunnum glasi er ikki eins orkukrevjandi sum at framleiða glas úr nýggjum rávørum. Kanningar, sum Rambøll hevur gjørt fyri IRF, vísa, at tað hevur minni $CO_2$-útlát við sær at útflyta glasið úr Føroyum til endurvinningar enn tað útlátið, sum hevði verið av at brent ella tyrvt glasið í Føroyum.

Umhvørvisliga og fíggjarliga hevði tað verið uppaftur betri, um glasið kundi verið beinleiðis endurnýtt í verkætlanum í Føroyum, og IRF er í gongd við at kanna møguleikarnar hesum viðvíkjandi.

**Talva 12** – Nøgdir av glasi til endurvinningar 2020-2024 (tons).

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Glas | 0 | 11 | 27 | 36 | 42 | 23 |




## Matolja

IRF útflutti í nøkur ár matolju til endurvinningar, men frá 2023 varð matoljan ikki longur útflutt, men í staðin latin oljureinsiverkinum hjá IRF. Matoljan verður nú gagnnýtt í Føroyum, eins og tann reinsaða spilloljan. Hetta er umhvørvisliga og fíggjarliga ein góð loysn, tí einhvør flutningur uttanlands hevur $CO_2$-útlát við sær, umframt at flutningurin er kostnaðarmikil. Nøgdirnar av matolju til endurvinningar eru minkaðar seinasta árið, men liggja tó eitt vet hægri enn miðaltalið fyri seinastu fimm árini (talva 13).

**Talva 13** – Nøgdir av matolju til endurvinningar 2020-2024 (tons).

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Matolja | 10 | 10 | 32 | 44 | 27 | 25 |

## Olja og oljudálkað vatn

Í 2024 tók oljureinsiverkið hjá IRF ímóti 5.501 tonsum av spillolju, oljudálkaðum vatni og matolju. Burtur úr hesum framleiddi verkið 1.586 tons av reinsaðari olju og 3.815 tons av reinum vatni, og 100 tons av evju vórðu reinsað frá. Oljuframleiðslan og vatnframleiðslan liggja nakað niðan fyri miðal seinastu fimm árini. Reinsaða oljan verður seld, reinsaða vatnið rennur á sjógv, og fráreinsaða evjan verður brend á brennistøðini.

**Talva 14** – Hagtøl fyri oljureinsiverkið 2020-2024 (tons).

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Reinsað olja | 1.805 | 1.897 | 1.276 | 1.589 | 1.586 | 1.696 |
| Reinsað vatn latið á sjógv | 4.056 | 3.781 | 3.988 | 4.360 | 3.815 | 4.029 |
| Evja frá Oljureinsiverkinum | 253 | 185 | 214 | 117 | 100 | 181 |
| **Móttikið á Oljureinsiverkinum** | **6.114** | **5.864** | **5.478** | **6.066** | **5.501** | **5.905** |



RESTBURTURKAST

## Brenning

Í 2024 tók IRF ímóti 22.459 tonsum av burturkasti til brenningar (talva 15). Av hesum vórðu 22.432 tons brend á Hagaleiti, og 27 tons vórðu brend á Kommunalu brennistøðini hjá Tórshavnar kommunu á Hjalla.

Nøgdirnar eru lægri enn miðaltalið fyri seinastu fimm árini, og staðfestast kann, at seinastu trý árini hava nøgdirnar ligið á einum jøvnum støði.

**Talva 15** – Burturkast til brenningar 2020-2024 (tons).

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Brent hjá IRF á Hagaleiti | 25.945 | 24.891 | 22.917 | 22.747 | 22.432 | 23.786 |
| Brent hjá KB á Hjalla | 134 | 71 | 64 | 8 | 27 | 61 |
| **Burturkast at brenna í alt** | **26.079** | **24.963** | **22.981** | **22.755** | **22.459** | **23.848** |

Brennistøðin á Hagaleiti var í rakstri 7.820 tímar í 2024 (talva 16). Tað samsvarar við 326 dagar ella 89,3 % av tíðini í 2024. Ovnurin brendi í miðal 2,9 tons um tíman, og tað samsvarar við 69 tons um samdøgrið.

Orkuframleiðslan hjá brennistøðini var 64.666 MWh í 2024, og av hesum vórðu 17.389 MWh veitt sum fjarhiti til Høvdavirkið og til IRF á Hagaleiti, og hetta er minni enn í 2023.

**Talva 16** – Rakstrarhagtøl fyri brennistøðina 2020-2024.

| | | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brennitímar | Tímar | 8.347 | 8.096 | 7.888 | 8.015 | 7.820 | 8.033 |
| Brennitímar | % | 95,0 | 92,4 | 90,0 | 91,5 | 89,3 | 91,6 |
| Brent hjá IRF. tons/tíma | Tons/tíma | 31 | 3.1 | 2.9 | 2.8 | 2.9 | 3.0 |
| Brent hjá IRF. tons/dag | Tons/samdøgur | 75 | 74 | 70 | 68 | 69 | 71 |

**Talva 17** – Orkuframleiðsla og fjarhitaveiting 2020-2024.

| | | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Orkuframleiðsla | MWh | 73.596 | 70.352 | 66.578 | 65.295 | 64.666 | 69.067 |
| Veittur fjarhiti | MWh | 16.389 | 14.765 | 20.545 | 18.830 | 17.389 | 17.853 |
| Veittur fjarhiti | % | 22,3 | 21,0 | 30,9 | 28,8 | 26,9 | 25,8 |

Talva 18 vísir, at í 2024 vórðu samanlagt 2.640 tons av ilsku frá brennistøðini á Hagaleiti tyrvd á tyrvingarplássinum í Nýggjheiðum. Hetta svarar til 118 kg av ilsku fyri hvørt tons av brendum burturkasti. Tess verri burturkastið er skilt, tess meira jarn, glas og annað er í burturkastinum at brenna, og tess størri nøgdir av ilsku fáa vit.

IRF hevur eina roykreinsiskipan við filtri, ið brúkar kálk og aktivt kol at reinsa roykin. Tað, sum verður reinsað úr roykinum, verður kallað flogøska ella roykreinsiburturkast. Flogøskan, sum er dálkað við m.ø. tungmetallum, verður útflutt og tyrvd á Langøya í Noregi. Flogøskan verður viðgjørd, áðrenn hon verður tyrvd, og virksemið á Langøya er umhvørvisgóðkent. Frá roykreinsiskipanini komu 457 tons av flogøsku í 2024, sum samsvarar við 20 kg av flogøsku fyri hvørt tons av burturkasti, sum varð brent á Hagaleiti í 2024.

**Talva 18** – Nøgdir av ilsku og flogøsku 2020-2024.

| | | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ilska | Tons | 3.563 | 3.402 | 3.212 | 2.754 | 2.640 | 3.114 |
| Ilska pr. brent burturkast | kg/tons | 137 | 137 | 140 | 121 | 118 | 131 |
| Flogøska | Tons | 469 | 485 | 422 | 510 | 457 | 469 |
| Flogøska pr. brent burturkast | kg/tons | 18 | 19 | 18 | 22 | 20 | 20 |






## Tyrving

Í 2024 tók IRF ímóti 4.378 tonsum av burturkasti at tyrva (talva 19). Hetta fevnir m.a. um asbest, PVC-plast, glas- og steinull, gips og keramikk umframt annað blandað tilfar at tyrva. Íroknað ilsku og viðgjørda rottangaevju frá IRF og KB vórðu í alt 10.005 tons tyrvd í Nýggjheiðum í 2024, sum er væl meira enn árini frammanundan.

Í mun til øktu tyrvinøgdirnar er tað týdningarmikið at hava í huga, at við nýggju støðini í Nýggjheiðum tekur IRF nú ímóti tyrviburturkasti úr øllum Føroyum, eisini úr Tórshavnar kommunu. IRF byrjaði spakuliga at taka ímóti tyrviburturkasti úr øllum Føroyum í 2023. Tá hækkaðu nøgdirnar sjálvsagt nakað, og tær hækkaðu samsvarandi í 2024, har IRF alt árið hevur móttikið tyrviburturkast úr øllum landinum.

Sum nakað nýtt byrjaði IRF í 2024 at útgreina og skráseta tyrviburturkastið í fleiri undirbólkar (talva 19). Alt tyrviburturkast verður skrásett í vekt, og nú fylgir IRF neyvt við, hvat slag av tyrviburturkasti kemur inn, og í hvørjum nøgdum. Hesi hagtølini eru sera góð at hava, tá ið íløgur og endurvinningarmøguleikar skulu raðfestast komandi árini.

**Talva 19** – Nøgdir av tyrviburturkasti, ilsku og rottangaevju, sum IRF hevur tyrvt (tons) 2020-2024.

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tyrviburturkast (tils.)** | **4.305** | **3.174** | **2.530** | **3.730** | **4.378** | **3.624** |
| Blandað tyrviburturkast | | | | | 1.873 | |
| Tungt tyrviburturkast | | | | | 1.740 | |
| Asbest og eternitt | | | | | 201 | |
| Gips | | | | | 363 | |
| Stein- og glasull | | | | | 202 | |
| **Ilska (tils.)** | **3.944** | **5.438** | **4.954** | **3.516** | **4.641** | **4.498** |
| Ilska IRF | 3.563 | 3.402 | 3.212 | 2.754 | 2.640 | 3.310 |
| Ilska Tórshavnar kommuna | 381 | 2.036 | 1.742 | 762 | 2.001 | 1.384 |
| Viðgjørd rottangaevja | | | | 1.024 | 986 | 1.005 |
| **Samanlagt** | **8.249** | **8.612** | **7.484** | **8.269** | **10.005** | **9.127** |

Í 2024 tyrvdi IRF 10.005 tons, harav vóru 4.378 tons av tyrviburturkasti, 4.641 tons av ilsku og 986 tons av viðgjørdari rottangaevju.





## Rottangatøming

Í 2024 vórðu samanlagt 10.226 rottangar tømdir í IRF-økinum (talva 20). Í IRF-økinum eru tilsamans 13.349 tangar skrásettir í 2024. Frá 2023 verður evjan avvatnað og viðgjørd á reinsiverkinum hjá IRF í Nýggjheiðum, og síðani verður hon tyrvd í stórsekkjum. Øll rottangaevja úr Tórshavnar kommunu kemur eisini til Nýggjheiðar. Sostatt verður øll rottangaevja í Føroyum viðgjørd og tyrvd í Nýggjheiðum.

Orsøkin til, at talið av tømdum tangum liggur á 77 %. er, at verkfall var í mai mánaði, og harafturat koyrir bilurin í Suðuroynni ikki væl. IRF hevur bílagt ein nýggjan rottangabil til Suðuroynna, sum væntandi kemur í 2026.

**Talva 20** – Rottangatøming 2020-2024 í IRF-økinum.

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av tømdum tangum | 3.931 | 7.562 | 7.834 | 11.716 | 10.226 | 7.128 |
| Samlað tal av tangum pr. 1. jan. | 12.433 | 12.761 | 12.780 | 13.031 | 13.349 | 12.634 |
| Tal av tømdum tangum í % | 32 % | 59 % | 61 % | 90 % | 77 % | 56 % |




**Talva 21** – Nøgd av rottangaevju viðgjørd á reinsiverkinum í Nýggjheiðum (tons).

| | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|
| Viðgjørd rottangaevja at tyrva | 1.024 | 986 | 1.005 |

## Um hagtølini

Øll hagtølini omanfyri fevna bert um alt tað burturkastið, sum IRF hevur tikið ímóti og hagreitt. Tað er nógv annað burturkast í Føroyum. Sum dømi kann nevnast tað burturkastið, sum Kommunala brennistøðin í Tórshavnar kommunu tekur ímóti, og eisini tað burturkastið, sum fleiri fyritøkur sjálvar senda av landinum til endurvinningar, t.d. metal, net, nótir, elektronikkur og klæði. Fleiri fyritøkur endurnýta og endurvinna eisini tilfar í Føroyum.

Best hevði verið, um burturkastshagtølini í Føroyum vórðu savnað á einum stað. Herundir tølini hjá IRF, tølini hjá Tórshavnar kommunu, og tølini hjá øðrum fyritøkum, sum gagnnýta ella flyta burturkastsbólkar av landinum. Tástani hevði veruliga endurvinningarprosentið av øllum burturkastinum í Føroyum verið eftirfarandi, og landspolitiskt hevði tað tá eisini borið til at arbeitt við ítøkiligum málum á økinum.

## Niðurstøða

IRF hevur havt sum langtíðarmál, at í 2030 skulu í minsta lagi 50 % av øllum burturkasti, sum IRF tekur móti, endurvinnast, Í mesta lagi 47 % skulu brennast, og í mesta lagi 3 % tyrvast.

Seinastu árini er marknaðurin fyri endurvinningartilfar tó sera nógv broyttur, og alsamt fleiri privatar føroyskar fyritøkur eru komnar inn á marknaðin. Onkur fyritøka endurvinnur tilfar í Føroyum, meðan fleiri aðrar útflyta og selja tilfar.

Umhvørvisliga sæð er henda broytingin góð, men hon hevur við sær, at langtíðarmálini hjá IRF mugu endurskoðast. Tað er ikki longur høpi í at tosa um býtið millum endurvinning, brenning og tyrving av øllum tí, sum IRF tekur ímóti, tá ið alsamt størri partar av endurvinningartilfarinum ikki longur koma til IRF.

At reinsaða vatnið frá oljureinsiverkinum ikki longur er partur av endurvinningarburturkastinum, hevur sjálvsagt eisini stóra ávirkan á møguleikan hjá IRF at røkka langtíðarmálinum um at endurvinna 50 % av burturkastinum.

Í 2025 kemur IRF eftir ætlan við nýggjum langtíðarmálum, sum í størri mun snúgva seg um t.d. at flyta burturkastsbólkar upp eftir burturkaststrappuni og um at arbeiða fram ímóti at gerast $CO_2$-neutral.





## Høvuðstøl í 1.000 kr

| | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | |
| Kommunugjøld | 42.416 | 41.337 | 40.977 | 39.928 | 39.406 |
| Aðrar inntøkur | 86.295 | 80.430 | 74.782 | 72.842 | 67.842 |
| **Inntøkur tilsamans** | **128.711** | **121.767** | **115.759** | **112.770** | **107.248** |
| | | | | | |
| **Útreiðslur** | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur | 100.339 | 97.091 | 93.397 | 87.098 | 85.250 |
| Avskrivingar | 16.552 | 17.567 | 18.554 | 18.131 | 18.139 |
| Rentuútreiðslur | 7.925 | 7.064 | 3.631 | 3.013 | 3.129 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **124.816** | **121.722** | **115.582** | **108.242** | **106.518** |
| | | | | | |
| **Úrslit** | **3.895** | **45** | **177** | **4.528** | **730** |
| | | | | | |
| **Eginogn** | **78.621** | **74.726** | **74.681** | **74.504** | **69.976** |

## Inntøkur 2024–2020




| Inntøkur | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Kommunugjøld | 42.416 | 41.337 | 40.977 | 39.928 | 39.406 |
| Aðrar inntøkur | 86.295 | 80.430 | 74.782 | 72.842 | 67.842 |

## Útreiðslur 2024–2020




| Útreiðslur | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 100.339 | 97.091 | 93.397 | 87.098 | 85.250 |
| Avskrivingar | 16.552 | 17.567 | 18.554 | 18.131 | 18.139 |
| Rentuútreiðslur | 7.925 | 7.064 | 3.631 | 3.013 | 3.129 |



## Ársúrslit 2024–2020




| | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Úrslit | 3.895 | 45 | 177 | 4.528 | 730 |

## Eginogn 2024–2020




| | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn | 78.621 | 74.726 | 74.681 | 74.504 | 69.976 |



# Gongdin í rakstrinum í 1.000 kr

| | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | |
| Kommunugjøld | 42.416 | 41.337 | 40.977 | 39.928 | 39.406 |
| Virkisburturkast v.m. | 70.253 | 64.901 | 57.193 | 54.683 | 53.137 |
| Oljureinsiverkið | 8.125 | 7.876 | 6.885 | 6.673 | 9.551 |
| Verkstaður | 635 | 581 | 1.225 | 896 | 1.199 |
| Søla | 7.282 | 7.072 | 9.479 | 10.590 | 3.955 |
| **Inntøkur tilsamans** | **128.711** | **121.767** | **115.759** | **112.770** | **107.248** |
| | | | | | |
| **Útreiðslur** | | | | | |
| Sáttmálaarbeiði | 1.566 | 1.797 | 1.770 | 1.612 | 1.716 |
| Lønarútreiðslur | 41.524 | 38.441 | 36.381 | 34.378 | 32.805 |
| Orka | 3.690 | 3.996 | 3.345 | 3.046 | 2.962 |
| Tilfar | 2.908 | 3.361 | 3.506 | 2.303 | 2.628 |
| Flutningur | 14.471 | 13.774 | 13.468 | 13.328 | 11.390 |
| Viðgerð uttanlands | 1.360 | 1.202 | 946 | 358 | 729 |
| Tyrvingarpláss | 5.722 | 5.238 | 4.503 | 5.392 | 5.553 |
| Størri amboð | 9.255 | 9.444 | 9.979 | 9.011 | 8.632 |
| Skrivstovuhald | 3.224 | 3.697 | 3.507 | 3.358 | 4.526 |
| Maskinanlegg | 3.061 | 3.138 | 4.032 | 2.816 | 2.626 |
| Bygningsumsiting | 711 | 738 | 492 | 503 | 650 |
| Verkstaður. PLC v.m. | 1.014 | 980 | 749 | 616 | 756 |
| Ferðing og umboðan | 1.317 | 1.467 | 1.137 | 1.035 | 1.391 |
| Uttanhýsistænastur | 1.382 | 1.511 | 1.829 | 2.048 | 1.392 |
| Tryggingar | 1.252 | 1.257 | 1.041 | 1.160 | 1.379 |
| Starvsfólkaútreiðslur | 7.882 | 7.050 | 6.712 | 6.134 | 6.115 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **100.339** | **97.091** | **93.397** | **87.098** | **85.250** |
| | | | | | |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **28.372** | **24.676** | **22.362** | **25.672** | **21.998** |
| | | | | | |
| Avskrivingar | 16.552 | 17.567 | 18.554 | 18.131 | 18.139 |
| | | | | | |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **11.820** | **7.109** | **3.808** | **7.541** | **3.859** |
| | | | | | |
| **Rentur** | | | | | |
| Fíggjarligar inntøkur | -104 | -157 | -92 | -68 | -69 |
| Fíggjarligar útreiðslur | 8.029 | 7.221 | 3.723 | 3.081 | 3.198 |
| **Rentur tilsamans** | **7.925** | **7.064** | **3.631** | **3.013** | **3.129** |
| | | | | | |
| **Rakstrarúrslit** | **3.895** | **45** | **177** | **4.528** | **730** |

# Rakstrarúrslit samanborið við fíggjarætlan í 1.000 kr

| | Roknskapur | Ætlan | Frávik | Frávik í % |
|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | |
| Kommunugjøld | 42.416 | 42.402 | 14 | 0,0% |
| Virkisburturkast v.m. | 74.378 | 75.356 | -978 | -1,3% |
| Landsstýrisgjald | 4.000 | 4.000 | - | 0,0% |
| Verkstaður | 635 | 581 | 54 | 9,3% |
| Søla | 7.282 | 7.160 | 122 | 1,7% |
| **Inntøkur tilsamans** | **128.711** | **129.499** | **-788** | **-0,6%** |
| **Útreiðslur** | | | | |
| Sáttmálaarbeiði | 1.566 | 1.820 | -254 | -14,0% |
| Lønarútreiðslur | 41.524 | 41.233 | 291 | 0,7% |
| Orka | 3.690 | 4.112 | -422 | -10,3% |
| Tilfar | 2.908 | 3.403 | -495 | -14,5% |
| Flutningur | 14.471 | 13.946 | 525 | 3,8% |
| Viðgerð uttanlands | 1.360 | 1.217 | 143 | 11,8% |
| Tyrvingarpláss | 5.722 | 6.681 | -959 | -14,4% |
| Størri amboð | 9.255 | 9.562 | -307 | -3,2% |
| Skrivstovuhald | 3.224 | 3.673 | -449 | -12,2% |
| Maskinanlegg | 3.061 | 3.376 | -315 | -9,3% |
| Bygningsumsiting | 711 | 597 | 114 | 19,1% |
| Verkstaður. PLC v.m. | 1.014 | 993 | 21 | 2,1% |
| Ferðing og umboðan | 1.317 | 1.418 | -101 | -7,1% |
| Uttanhýsistænastur | 1.382 | 1.586 | -204 | -12,9% |
| Tryggingar | 1.252 | 1.255 | -3 | -0,2% |
| Starvsfólkaútreiðslur | 7.882 | 8.071 | -189 | -2,3% |
| **Útreiðslur tilsamans** | **100.339** | **102.943** | **-2.604** | **-2,5%** |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **28.372** | **26.556** | **1.816** | **6,8%** |
| Avskrivingar | 16.552 | 18.363 | -1.811 | -9,9% |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **11.820** | **8.193** | **3.627** | **44,3%** |
| **Rentur** | | | | |
| Fíggjrligar inntøkur | -104 | - | -104 | 0,0% |
| Fíggjarligar útreiðslur | 8.029 | 7.885 | 144 | 1,8% |
| **Rentur tilsamans** | **7.925** | **7.885** | **40** | **0,5%** |
| Rakstrarúrslit | 3.895 | 308 | 3.587 | 1.164,6% |



# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2024 hjá L/F Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum IRF.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ársroknskaparlógina og galdandi roknskaparleiðbeiningar.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu, rakstrarúrslitinum og peningastreyminum.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Sandur, tann 29. apríl 2025

*Stjórn:*

**Sigurd Leifsson Lamhauge**
Stjóri

*Nevnd:*

| | | |
|---|---|---|
| **Gunvá við Keldu**<br>Nevndarforkvinna | **Oluf Müller**<br>Næstformaður | **Hans Anders Jacobsen**<br>Nevndarlimur |
| **Alvi Mortensen**<br>Nevndarlimur | **Jóanis Albert Nielsen**<br>Nevndarlimur | **Bjarki Henriksen**<br>Nevndarlimur |

# Váttan frá óheftum grandskoðara

**Til eigararnar í L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin (IRF)**

## Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin (IRF) fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2024 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2024 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2024 samsvarandi ársroknskaparlógini.

## Grundarlag fyri niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

